Fróðskaparsetur Føroya
University of the Faroe Islands

Føroyamálsdeildin
Department of Language and Literature

# Skeiðslýsing
# *Course description*

## Heystið 2018

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Skeiðsnummar**<br>*Course number* | 1456.18 | **ECTS**<br>*ECTS* | 10 | **Ábyrgd**<br>*Contact* | Malan Marnersdóttir |

| | |
|---|---|
| **Stig**<br>*Level* | MA |
| **Heiti**<br>*Title* | Realisma og poesi í ritverkinum hjá Heðini Brú (MA) |
| **Endamál**<br>*Aim* | Endamálið við skeiðnum er at fáa eitt yvirlit til vegar yvir ritverkið hjá Heðini Brú, vísa á samanspælið millum realistiska og poetiska prosa og umrøða ritverkið í føroyskari og norðurlendskari menta- og bókmentasøgu. |
| **Innihald**<br>*Content* | Á skeiðnum verða úrvald verk og tekstir greinað við atliti at temum og skrivihátti. Lisin verða samtíðarverk úr øðrum londum, bókmentafrøðiligar greinir um realismu og poesi umframt bókmentafrøðiligar viðgerðir av ritverkinum og ummæli. |
| **Læru- og undirvísingarhættir**<br>*Learning and teaching approaches* | Lærara- og studentaframløgur og uppgávur. Dentur verður lagdur á framløgu og orðaskifti. |
| **Próvtøkuháttur**<br>*Assessment method* | Samansett próvtøka við spurningi og framløgu. Studentarnir fáa 3 dagar at fyrireika munnliga framløgu (30 min.) við tilfari um uppgivið evni. |
| **Lestrarlisti**<br>*Literature* | Verður útflýggjaður við skeiðsbyrjan. Lisnar verða í minsta lagi *Fastatøkur, Feðgar á ferð* og stuttsøgur úr *Fjallaskugganum, Flókatrøllum* og *Búravninum* og *Tobacco Road* eftir Erskine Caldwell. |
| **Læruúrtøka**<br>*Learning outcomes* | Tá skeiðið endar, duga studentarnir at<br>• greina tekstir eftir Heðin Brú<br>• greiða frá gongdini í ritverkinum<br>• lýsa sambandið hjá tí við føroyskar, norðurlendskar og aðrar bókmentir<br>• lýsa ástøði um realismu, poesi og um tekstsløg<br>• duga at brúka hugtøkini í greining av skaldskapi eftir Heðin Brú<br>• viðgera greiningar av ritverkinum kritiskt |
| **Fortreytir**<br>*Prerequisites* | Studenturin skal hava staðið BA í føroyskum ella samsvarandi. Til ber eisini at taka skeiðið sum stakskeið við øðrum fortreytum (víst verður til galdandi námsskipan). |

| | |
|---|---|
| **Próvdøming**<br>*Examination* | Uttanhýsis. |
| **Próvtalastigi**<br>*Marking scale* | Galdandi próvtalsstigi. |